# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Heini Johansen 75 ár



Leygardagin 17. januar fylti Heini Johansen í Vestmanna 75 ár. Heini er havnarmaður, sonur Dagmar og Herluf Johansen.

Hann lærdi til timburmann hjá pápanum, sum var timburmeistari. Síðan lærdi hann til skrivstovumann á Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna frá 1953 til 1956, tá hann fekk starv í Føroya Banka, har hann eisini fekk útbúgving sum bankamaður.

Í 1963 bleiv hann settur sum deildarleiðari hjá Føroya Banka í Vestmanna. Hetta starv røkti hann til 1994.

Heini hevur eisini sitið á Løgtingi. Í tíðarskeiðinum 1991-94 var hann eykamaður hjá Thomasi Arabo, umboðandi Javnaðarflokkin.

Heini er giftur við Finngerð f. Pætursdóttir Dam, av Tvøroyri, dóttir Ragnhild og Peter Mohr Dam. Tey eiga tveir synir, sum báðir eru maskinmeistarar.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Martha Matras**, fødd Mørkøre, úr Havn, andaðist sunnudagin 25. januar, 99 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju mikudagin 28. januar kl. 13.

**Jákup Jacobsen**, vanliga nevndur Jákup á Báraldarbakka, í Vági, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi leygardagin 24. januar, 93 ára gamal.

**Dagurin**
**27. januar. Chrysostomos**, deyður ár 407. Jóannes æt hann, men fekk navnið Chrysostomos (gullsmiður), av tí at hann var tiltikin at prædika. Var patriarkur í Konstantinopel, men fekk so nógvar fíggindar innan fyri kirkjuliðið, at hann fleiri ferðir mátti taka til rímingar, og á einari av ferðunum doyði hann, men varð seinni skírdur halgimenni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Realskúlanæmingar hittust í 1990



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin er av realskúlanæmingum sum hittust aftur í 1990 á Ingutrøð.

**Aftara rað f.v.:** Sigrid Winther (Arge), Sanna W. Johansen (í Brekkunum), Ása Joensen (undir Kletti) og Anna Sofía Restorff.

**Fremra rað f.v.:** Gunnvør av Reyni, Marjun C. Joensen (Marion Kauffeldt)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Marion Kauffeldt*

Fyri 25 árum síðan:

## Skaðaódn í 1984





Sosialurin 24. januar 1984 skrivar um ódnarveðrið sum leikaði í sunnunáttina og sunnudagin 22. januar og sum kostaði nógvar milliónir krónur.

Í blaðnum eru fleir myndir úr Vágsbotni, har tað var eitt øgiligt sorl og eystari moli í Havn fekk heilt stóran skaða og øll skipini sum lógu við molan slitu og Bakur hjá Skipafelagnum rak inn á Skinnarasker innanvert Tinganes. Sjúkrabáturin Reyði Krossur sleit og rak inn í krókin í Vágsbotni.

Flotbrúgvarnar fingu skaða, og fleiri bátar sukku.

Tað var ikki bara í Havn at nógvir skaðar vóru, eisini við fleiri havnir og havnaløg kring landið fingu stóran skaða.

Lesið Sosialin - so eru tit við